

*- Eg haldi, at vit eiga at halda skil á ymisku veiðibólkunum og fiskasløgunum – og ikki blanda alt saman, sigur reiðarin á Norðborg, Kristian Martin Rasmussen*

# evja í øllum



*- Nú vilja allir sleppa uppí. Tað verður snakkað nógv, og nógv lobby-arbeiði fer fram, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari*

Eg skilji væl, at man sær eina ójavnvág í. Hetta er ein máti, sum eftir mínum tykki kann brúkast. Hetta verður eisini gjørt í dag. Vit býta makrel um við russar, sum aftur gevur føroysku flakatrolarunum kvotur í russiska partinum av Barentshavinum. Vit býta eisini sild um tosk í Grønlandi, eins og vit býta uppisjóvarfisk um við Ísland. Hetta er einki ónatúrligt, um rúm er fyri hesum, og hesum kann vera skil í. Men at allur flotin skal fara at leggja um at fiska makrel fyri tað, um nógvur makrelur er í føroyskum sjógvi nú – tað haldi eg heilt lítið um. Tað meini eg veruliga, tí tað eru aðrir og skilabetri mátar at gera tað upp á, sigur reiðarin á Norðborg.

## Føroyska kvotan

Men hevur Kristian Martin Rasmussen nakað boð upp á, hvussu stóra makrelkvotu landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eigur at áseta Føroyum í ár, nú semja heldur ikki fekst millum strandalondini um felagsbýtið fyri 2011?

- Eg havi fleiri ferðir sagt á fundi, at so leingi, vit ikki hava eina avtalu, og Føroyar hava boðað frá, at vit meta okkum at eiga 15% av heildarkvotuni, at vit skulu halda okkum til hetta – fyri at hava eitt mynstur í. Í fjør góvu 15% 85.000 tons, og nú heildarkvotan er nakað størri, verður føroyski parturin eisini nakað størri í ár enn í fjør.

Og so til seinast.

Hvussu heldur reiðarin á Norðborg so, at býtið av føroyska partinum skuldi sæð út í ár?

- Tað havi eg ikki nakað boð upp á. Nú vilja allir sleppa uppí. Tað verður snakkað nógv, og nógv lobbyarbeiði fer fram. Eg vóni bara, at Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, finnur eina skilagóða loysn.

Kristian Martin Rasmussen leggur dent á, at tað eru aðrir mátar at regulera upp á enn at fara og blanda alt saman og lata allar bólkar fiska alt, tí tað ber slett ikki til.

- Vit hava eisini gulllaks. Nú gongur við við gulllaksi, men fóru øll skip at fiska gulllaks, so hevði tað eisini verið liðugt. Um allir farin í Barentshavið, so gongur tað heldur ikki. Eg haldi, at vit eiga at halda skil á hesum – og ikki blanda alt saman, sigur reiðarin á Norðborg, Kristian Martin Rasmussen.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Nú vilja línuskipini eisini fáa lut í makreltilfeinginum í føroyskum sjógvi*

# Línuskipini vilja nú eisini hava makrel

**Felagið Línuskip hevur sent Fiskimálaráðnum skriv, har felagið eisini vil hava sín part av makreltilfeinginum undir Føroyum**

Vilmund Jacobsen

Tað eru bert tveir skipabólkar, sum í fjør ongan lut fingu í makreltilfeinginum undir Føroyum. Hesir vóru línu-og garnaskipini.

Hóast hvørgin av hesum skipabólkum hevur møguleika at veiða makrel, vilja línuskipini nú eisini gerast partur av hesum tilfeingi.

Sosialurin veit, at Felagið Línuskip hevur sent skriv til Fiskimálaráðið, har felagið ynskir at fáa lut í makreltilfeinginum.

Men hvussu kunnu línuskip so fáa nakað burtur úr hesum, tá makrelur ikki verður veiddur við línu?

Soleiðis, sum Sosialurin hevur skilt, ynskir Felagið Línuskip at gerast partur av hesum tilfeingi, og fáa línuskip tillutaða kvotu, kunnu feløgini, sum eiga skipini, fáa aðrar skipabólkar at veiða kvotuna fyri seg og soleiðis fáa nakað burtur úr.

## Neyvan dyrging

Í fjør heyst vórðu royndir gjørdar at dyrgja eftir makreli í føroyskum sjógvi. Slíkar royndir hava verið gjørdar seinnu árini, men hava ivaleyst ikki eydnast so væl, sum ynskiligt hevði verið.

Tað er neyvan dyrging, ið teir, sum eiga línuskipini, hugsa um.

Bæði í Noreg og Íslandi er veiða við dorg eftir makreli vorðin týðandi fyri útróðrarmenn, og serliga í Noregi hevur makrelur verið veiddur við dorg í nógv ár

Sosialurin hevur skilt, at útróðrarmenn í Noregi árliga veiða eini 20.000 tons av makreli um árið, og tað hevur eisini ljóðað, at íslendskir útróðrarmenn veiddu eini 12.000 tons við dorg í fjør.

*vilmund@sosialurin.fo*